gult16 cyan16 magenta16 svart16



# Føroyar á einum vegamóti - svar til Jóanes Eidesgaard



Kristina Háfoss

Í sambandi við grein mína í undanfarnu viku við heitinum »Enn eitt rokniark« kom Jóanes Eidesgaard (JE) við nøkrum viðmerkingum í Sosialinum týsdagin. Fari at takka JE fyri viðmerkingarnar og hervið svara fyrispurningum, ið hann setti og somuleiðis gera nakrar viðmerkingar.

## Rokniark – eitt amboð

Í undanfarnu grein míni vísti eg m.a. á, at búskaparligar útrokningar – eitt nú í rokniarki – byggja á metingar av óvissum fyritreytum. Av tí, at tílíkar metingar altíð vilja verða ymiskar, alt eftir hvør ger hesar og í ávísum førum eisini alt eftir, hvat útrokningarnar skulu nýtast til, vilja tílíkar búskaparligar útrokningar eisini kunna misnýtast.

Við hesum varð ikki sagt, at Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin ella Landsstýrið hava nýtt útrokningar til at fremja síni áhugamál og fjala veruleikan. Tó er greitt, at ongin av pørtunum vildu lagt fram útrokningar í gingu ímóti ætlanum teirra og hartil kemur, at útrokningar, ið ein politiskur flokkur letur gera sjálvan eru heilt óheftar. Serstakliga um hildið verður loyniligt, hvør hevur gjørt útrokningarnar vegna flokkin.

Eg eri sjálvsagt samd við JE í, at ein ikki kann síggja burtur frá nøkrum útrokningum bert tí einum ikki hóvar amboðið, ið nýtt verður. Hetta er sjálvsagt. Hinvegin fellur upplýsandi endamálið við at nýta hetta amboð til at gera búskaparligar metingar í stóran mun burtur, tá ið tríggjar ymiskar framrokningar verða gjørdar – allar við ymiskum fortreytum og úrslitum.

Ymisku metingarnar eru tó somuleiðis ein staðfesting av, at búskapur er sera skiftandi og ofta torførur at spáa um. Metingarnar um framtíðar fyritreytirnar vilja tískil ofta verða ólíkar, alt eftir hvønn búskaparfrøðing prátað verður við.

Eins og eg vísti til í undanfarnu grein míni, er tískil neyðugt, at støðutakanin til framtíðarstøðu Føroya verður grundað á annað enn ótryggar búskaparligar útrokningar.

## Inntøkumetingar

JE ynskir nakrar viðmerkingar til tær inntøku- og útreiðslumetingar, ið Javnaðarflokkurin hevur lagt til grund fyri sínum búskaparligu útrokningum.

Eg skal byrja við at viðmerkja, at eg, til tess at avmarka hetta svarið til JE, fari at gera viðmerkingar, tó uttan at koma inn á alt ov nágreinligar búskaparligar greiningar og frágreiðingar um búskaparligar fyritreytir, myndlar og árin.

Um vit hyggja at inntøkumetingini í framrokningunum, so rokna bæði Javnaðarflokkurin og Føroya Landsstýri við einum inntøkuvøkstri á 2 % árliga realt (frároknað prísvøkstur). Hetta er væl lægri enn søguligi miðalvøksturin í Føroyum – svarar til uml. helvtina av søguliga vøkstrinum í útflutninginum.

Helst er henda meting tó á góðari leið, tí hædd skal sjálvsagt takast fyri, at í hesum er íroknað, at ríkisstuðulin fellur burtur eftir 4 árum og fer hetta at minka um inntøkuvøksturin í hesum tíðarskeiðnum. Hinvegin er greitt, at føroyski búskapurin hevur haft stóran vøkstur seinastu árini og komandi árini síggja somuleiðis positiv út og kemur gongd í oljuvinnuna, kemur inntøkuvøksturin uttan iva at gerast væl hægri enn 2% árliga.

Veruligi inntøkuvøksturin komandi árini kemur sjálvsagt somuleiðis í stóran mun at verða heftur at nær ríkisveitingin verður skorin burtur og eftir hvørjum áramáli, eins og politikkurin, ið førdur verður framyvir kemur at fáa alstóran týdning.

## Útreiðslumetingar

Um útreiðslumetingina í framrokningunum kann sigast, at meðan Javnaðarflokkurin roknar við einum realum vøkstri í almennu útreiðslunum á 1,5%, so hevur landsstýrið roknað við einum vøkstri á 0,8% komandi árini.

Greitt er, at seinastu 3 árini eru almennu útreiðslurnar vaksnar væl meira enn báðar metingarnar omanfyri, men skyldast hetta fyrst og fremst, at føroyska samfelagið í kreppuárunum varð skert á nógvum umráðum – ikki minst innan tað almenna – og fyri at bøta um hesar skerjingar og fyri at fáa samfelagið upp aftur á tað støðið tað var, hevur hetta m.a. kravt øktar útreiðslur til økta nýtslu og fleiri íløgur. Somuleiðis hevur nýggja stýrisskipanin og nýggja skipanin av miðfyrisitingini haft sín leiklut í øktu útreiðslunum.

Hóast tað altíð vilja verða umráði, ið krevja meira pening, so er samfelagið komið uppá rættkjøl og stevnir nú fram móti enn betri tíðum. Hetta ber boð um lægri útreiðsluvøkstur, men tað vil tó verða torført at meta um framtíðar vøksturin í almennu útreiðslunum. Útbjóðingar og privatiseringar av almennum tænastum, yvirtøka av málsøkjum, umskipan av føroysku fyrisitingini, sparingar, lønarvøkstur v.m. fara at fáa ávirkan. Um útreiðsluvøksturin fer at gerast 0,8% , 1,5% ella okkurt heilt triðja kemur tískil í stóran mun at verða heft at, hvønn politikk komandi landsstýri fara at føra. Eg fari tískil ikki at koma við nakrari meting hesum viðvíkjandi.

Leggjast skal afturat, at um tillagingin av føroyska búskapinum frá studningsbúskapi til sjálvberandi búskap ikki skal gerast ov tung er av sera stórum týdningi, at útreiðsluvøksturin verður minni enn inntøkuvøksturin og hetta uppfylla metingarnar hjá bæði Føroya Landsstýri og Javnaðarflokkinum – sjálvt við niðurskurði av ríkisveitingini eftir 4 árum.

## Ríkisstuðulin – enn einaferð

JE vil verða við, at eg skal hava sagt nakað, ið grein míni, ið kundi borið á, at eg gav ríkisstuðlinum skyldina fyri tí, ið hendi í 1980'inum. Hetta má verða ein misskiljing. Ríkisstuðulin hevur sum so ikki skyldina og fer heldur ikki at fáa skyldina fyri farnum ella komandi kreppum. Tað er tann mátin, ið ríkisstuðulin hevur verið nýttur og búskaparstýringin sum heild, ið skyldin skal vendast ímóti.

Greitt er, at tað at samfelagið fær ein ríkisstuðul á hvørjum árið ikki pr. definitión fær árin á búskapin. Um ríkisstuðulin eitt nú varð nýttur til ávísar føroyskar íløgur, útlendskar íløgur, útlendsk virðisbrøv v.m. og soleiðis ikki varð slúsaður inn í føroyska búskapin í tann mun ríkisstuðulin hevur verið higartil, so hevði hesin heldur ikki haft tey negativu árin, ið ofta verður víst til í samband við ríkisstuðulin. Hinvegin høvdu Føroyar ivaleyst heldur ikki fingið ríkisstuðul um hesin ikki varð nýttur til almenna nýtslu yvir eitt longri áramál.

Tá ið ríkisveitingarskipanin varð broytt frá at verða ein sokallað refusiónsskipan til núverandi blokkstuðulsskipan helt ríkisstuðulin áfram við at verða nýttur til at gjalda fyri almennar tænastur. Ríkisstuðulin hevur tískil verið slúsaður inn í føroyska búskapin og hevur hesin haft stóra ávirkan. Eg skal ikki koma inn á øll tey búskaparligu árin, ið tílíkur stuðul ber við sær, men bert nevna nøkur, so sum hægri lønar- og prísvøkstur, størri almenn nýtsla og fleiri íløgur, størri almennur sektorur í mun til tann privata sektorin v.m.. Árin, ið við fyrsta eygnabráð ikki tykjast at verða negativ, men sum yvir eitt longri áramál eru við til at avlaga búskapin og harvið endar vanligi borgarin í nógvum førum við als ikki at fáa meira burturúr – hóast ríkisstuðulin.

## Samfelagstillaging

JE spyr m.a. hvat tað er, sum forðar okkum í dag at gera tillagingar av samfelagnum, ið eg vísi til í grein míni. Ja, ein kundi spurt seg sjálvan – hví hava vit ikki longu tillaga samfelagið og búskapin ?

Veruleikin er tann, at vit vegna heimastýrisskipanina í stóran mun hava skipað føroyska samfelagið eftir donskum leisti. Lógarkervið, fólkaskúlin, skipanin av almennu fyrisitingini o.s.fr. – eru skipað eftir donskum leisti. Ikki tí, at danskar skipanir í sær sjálvum eru nakað ringt, men tað sigur seg sjálvt, at eitt lítið samfelag sum tað føroyska við bert 45.000 íbúgvum ikki skal hava somu skipanir sum eitt samfelag við yvir 5 mió. íbúgvum. Hetta vil tað fyrsta verða ov dýrt og fyri tað næsta í nógvum førum ikki nøkta tann tørv, ið eitt lítið samfelag hevur. Stórur munur er á samfeløgunum og átti somuleiðis at verið við skipanini av samfeløgunum.

Orsøkin til, at vit hava havt ráð til hesa skipan av føroyska samfelagnum skyldast fyrst og fremst ríkisstuðlinum, og ríkisstuðulin hevur eisini á henda hátt í stóran mun verið við til at ávirka alla tí føroysku samfelagsskipanina – bæði til tað betra og verra.

Brúk er tískil fyri eini rættuligari umfatandi tillaging av føroyska samfelagnum og verður hetta ikki gjørt eftir einum degi. Arbeitt verður í løtuni við at skipa eina føroyska løgreglu, føroyska tilbúgving, føroyska grundlóg v.m., og eru vit tí á rættari leið, men enn er langt eftir á mál áðrenn ein fullkomin tillaging er farin fram.

## Politiskur hugburður

Og sum um tað ikki var nógmikið at hava eina so umfatandi samfelagsuppgávu fyri framman, so hava vit eina fólkaræðisliga skipan – ið føroyska samfelagið sjálvsagt skal hava – men sum somuleiðis inniber, at politikarar fegin vilja tekkjast sínum veljarum til tess at verða valdir inn aftur. Hetta verður ofta gjørt við at lova veljarnum fleiri og betri tænastur, lægri skatt v.m. – lyfti, ið m.a. krevja størri almennar útreiðslur og lyfti, ið gera tað trupult at fremja skjótar tillagingar. Ikki tí – tillaging fer ikki pr. definitión at týða, at fleiri og betri tænastur og lægri skattur ikki kunnu veitast. Hetta vil bert ikki verða møguligt meðan tillagingin fer fram. Ágóðarnir koma seinni.

Tann umfatandi tillagingin, ið krevst, saman við tí politiska hugburðinum ger, at tað ikki ber til at tillaga føroyska samfelagið og gera tað sjálvberandi eftir einum degi, um hetta skal gerast uttan at hava ov stór árin á samfelagið.

## Meira vælferð fyri minni pening

JE spyr eisini um, hvørja ávirkan ein tillaging av føroyska samfelagnum fer at fáa á vælferðina, og skal eg bert viðmerkja, at ein tillaging frá donskum skipanum til føroyskar skipanir fer – sambært míni meting – at bera við sær, at skúlar, stovnar, fyrisiting o.s.fr. fara at nøkta føroyska tørvin í størri mun enn í dag, samstundis sum hetta fer at kosta samfelagnum minni pening. Tvs. – um rætt verður borið at – meira vælferð fyri minni pening.

## Føroyar á einum vegamóti

Nú danska stjórnin hevur gjørt greitt, at hon ikki góðtekur yvirtøkur um endamálið er, at Føroyar skulu gerast fullveldisríki er klárt, at heimastýrisskipanin nú ikki longur kann verða nýtt til upprunaliga endamálið – nevnliga at yvirtaka málsøkir við tí endamáli at koma nærri føroyskum fullveldi. Neyðugt er tískil nú at taka eina avgerð um framtíðarstøðu Føroya.

Á fyrisitingar- og lógarøkinum hava vit í dag skipanir, sum í alt ov stóran mun eru kopi av donskum skipanum. Til tess at umskipa hesar til føroysk viðurskifti krevjast stórar tillagingar og nýhugsan. Tillagingar, ið fara at krevja at landsins leiðsla hevur rygg til at taka nakrar stórar avgerðir – avgerðir, ið við fyrsta eygnabrá kunnu tykjast torførar, men sum yvir eitt áramál fara at bera frukt. Tílíkar avgerðir verða neyvan tiknar uttan tær eru partur av eini størri ætlan – eitt nú eini ætlan, ið skal skipa eitt sjálvberandi føroyskt samfelag í allar mátar.

Eftir kreppuárini hevur føroyski búskapurin verið merktur av stórum vøkstri, gjaldsjavnaavlopi og at nettoskuldin í útlondum er broytt til nettoogn. Landskassin hevur í sama tíðarskeiði fingið stórt avlop og er hetta vaksið ár undan ári. Vøksturin stavar m.a. frá betri fiskiskapi, hægri fiskaprísum, betri kappingarføri og sokallaðum konjukturvøkstri, ið stendst av, at kreppan hevur skapt ein stóran tørv á øllum nú tíðirnar eru vornar betur.

Búskapurin er í dag er nógv minni heftur at ríkisveitingini enn áður. Seinastu trý árini er støðugt meira av ríkisstuðlinum hildin uttanfyri føroyska búskaparrenslið. Undanfarna ár vórðu sostatt bert 373 milliónir nýttar. Men greitt er, at eitt avlop á almennu fíggjarætlanini á góðar 600 mió. kr. setur eitt sera stórt press á politikarnir, ið sita við landsins leiðslu. Krøv um øktar játtanir koma úr øllum samfelagnum – eins og vanligt er – og verður givið eftir og verður avlopið á góðar 600 mió. kr. aftur slúsað út í samfelagið er vandi fyri, at búskapurin verður yviruppहitaður – at prísstøðið hækkar, kappingarførið versnar, útflutningurin minkar o.s.fr..

Skal føroyski búskapurin gerast sjálvberandi og óheftur er neyðugt, at tillaging av samfelagnum og niðurskurður av ríkisveitingini fer fram nú meðan søguligar búskaparligar umstøður eru til hettar. Hetta fer í stóran mun at krevja, at føroysku politikarnir hava rygg til at føra ein skilagóðan búskapar- og fíggjarpolitikk.

Føroyar eru sostatt á einum vegamóti. Á nógvum økjum er neyðugt at týðandi avgerðir verða tiknar – avgerðir, ið koma at mynda framtíð Føroya.



## Mánadagur 25. juni

**SVF**

18.30 Likkulikkuleia 4 (e)
19.00 Vilhelm Tell 10:16
19.50 Ikki meira enn 30% - donsk matsending
20.20 Læknin hevur orðið
20.50 Kaldir føtur 12 – ensk kærleiksrøð
21.40 Mannakroppurin 3:3 – dokumentarsending frá BBC
22.30 New York Blues – am. spenningsrøð
23.20 Liðugt

**Eurosport.com**

07:30 Cart
09:00 Superbike
10:00 Tennis
11:00 Football
12:30 Supersport
13:30 Sidecar
14:30 Table Tennis
15:30 Cycling
16:00 Cycling (Live)
17:00 News
17:15 Football (Live)
18:45 Football (Live)
20:30 All Sports
21:00 Athletics
22:00 News
22:15 Football
23:15 Cycling
00:15 News
00:30 Close

**BBC Prime**

00.00 TLZ: »In the Footsteps of Alexan-der the Great – Across the Hindu Kush«
01.00 TLZ: »Cracking the Code – The Cancer Hunters«
02.00 TLZ: »Nathan the Wise«0
02.30 TLZ: »Max Ernst and the Surrealist Revolution«
03.00 TLZ: »Ships and Boats and Strain«
03.30 TLZ: »A Migrant's Heart«
04.00 TLZ: »Blood on the Carpet – Sausage Wars«
04.40 TLZ: »Megamaths – Measure - Decorating«
05.00 TLZ: »Suenos World Spanish«
05.15 TLZ: »Suenos World Spanish«
05.30 TLZ: »English Zone«
06.00 Noddy: »Noddy Borrows Some Trousers«
06.10 Angelmouse
06.15 Playdays
06.35 Blue Peter
07.00 Get your own Back
07.30 Celebrity Ready, Steady, Cook
08.00 Style Challenge: »Questions and Answers«
08.25 Real Rooms: »Alderminster School House«
08.55 Bargain Hunt
09.25 Antiques Roadshow: »Knebworth House«
10.10 Horizon: »Hopeful Monsters«
10.40 Wildlife: »Wild Boar: King of the Wildwood«
11.30 Gardeners' World
12.00 Celebrity Ready, Steady, Cook
12.30 Style Challenge: »Marquess of Bath«
13.00 Doctors
13.30 EastEnders
14.00 Real Rooms
14.30 Bargain Hunt
15.00 Noddy: »Noddy Borrows Some Trousers«
15.10 Angelmouse
15.15 Playdays
15.35 Blue Peter
16.00 Get your own Back
16.30 Top of the Pops
17.00 Home Front
17.30 Doctors
18.00 Classic EastEnders
18.30 Jeremy Clarkson's Extreme Machines
19.00 Hi-De-Hi
19.30 Next of Kin: »The Cub Mistress«
20.00 Vanity Fair
21.00 Ruby's American Pie: »Harvesting Eggs«
21.30 Top of the Pops 2
22.00 Parkinson
23.00 The Lakes

**BBC World**

00.00 BBC News
00.30 Correspondent (r)
01.00 BBC News
01.30 Jeremy Clarkson's Extreme Machines (r)
02.00 BBC News
02.30 Dateline London (r)
03.00 BBC News
03.30 Asia Today (r)
03.45 Reporters (r)
04.00 BBC News
04.30 Earth Report (r)
05.00 BBC News
05.30 Future Fantastic (r)
06.00 BBC News
06.30 Euro Brief
07.00 BBC News
07.30 HARDtalk
08.00 BBC News
08.30 Click Online (r)
09.00 BBC News
09.30 Correspondent (r)
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News
11.30 Jeremy Clarkson's Extreme Machines (r)
12.00 BBC News
12.30 Correspondent (r)
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk (r)
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Future Fantastic (r)
15.00 BBC News
15.30 Correspondent (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Click Online (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Holiday
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Earth Report
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

**TV3**

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Panter-tanter
12:20 Vild med dig
12:50 Melrose Place - classic
13:45 Interne Affærer
14:45 Pæn pige - sej sild
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch
16:35 Ricki Lake
17:30 Med på moden
18:00 Susan - sød og single
18:30 Hvide Løgne
19:00 Det Perfekte Kup
20:00 Mandagsbio: Strømer i børnehaveklassen
22:05 Falcone
23:05 Vore værste år
23:35 Simpsons
00:05 Ti tommelfingre
00:35 Monty Pythons flyvende cirkus
01:15 Ricki Lake(G)
02:10 Træneren
02:40 Vore værste år (G)
03:05 Monty Pythons flyvende cirkus(G)
03:40 Sunset Beach
04:25 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Eli Poulsen í Sumba lesur
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar Dia Midjord og Jákup Magnussen leggja til rættis.
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar Dia Midjord og Jákup Magnussen leggja til rættis.
09.00 Tíðindi
09.03 Sunnudagsløtan (e) Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
09.30 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) Eli Poulsen í Sumba lesur
10.00 Tíðindi
10.05 Fimleikaløtan - vika 2 Beinta Danielsen og Elsa Maria Bærentsen skipa fyri.
10.10 Tit skriva, vit spæla Øssur Egholm leggur til rættis.
11.00 Tíðindi
11.03 Løg mær dámar (e) Kjeld Thomsen leggur til rættis. 1. sending.
11.33 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.50 Døgurðatónar
13.00 Ítróttatímin (e) Kristian Joensen og Ragnhild Ellingsgaard stíla fyri
13.45 Aktuelli gesturin (e)
14.00 Blái akurin (e) Leygarkvøldssending hjá Birgiri Kruse.
15.00 Tíðindi
15.03 Zenith Helena Debes Højgaard, Beinta Løwe Jacobsen og Høgni í Jákupsstovu skipa fyri.
16.00 Tíðindi
16.03 Zenith
17.00 Tíðindini
17.05 Hvat nú? Elis Poulsen leggur til rættis
18.00 Gjallarhornið Kári Sverrisson leggur til rættis.
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Koparskrínið Dánjal Joensen lesur 8. og seinasta part av framhaldssøgu eftir Jens Paula Heinesen.
19.30 Rák Tónleikasending hjá Kim Hansen.
20.00 Summarjazzur Edward Nyholm Debes spælir tónleik.
21.00 Fimleikaløtan - vika 2 (e) Beinta Danielsen og Elsa Maria Bærentsen skipa fyri.
21.05 Dagsetur Øssur Egholm skipar fyri.
22.00 Tíðindi

**Rás 2**

09:45 Orðið Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Góðanmorgun-tónleikur
12:00 Tíðindi & lýsingar
12:15 Tónleikur
13:00 Leysaløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi & lýsingar
15:15 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Birgir Beinleiðis (e) Birgir Sondum við gesti
17:00 Lættur tónleikur
18:00 Tíðindi & lýsingar
18:15 Lættur tónleikur
19:00 Orð á leiðini (e) EvR Sending Missión: "Broytið hugburð um missión?" Jógvan Zachariassen leggur til rættis Endursending frá hósdegnum.
19:40 Lættur tónleikur
21:00 Tíðindi & lýsingar
21:15 Orðið (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Halleluja Andalig tónleikasending Heine Lútzen leggur til rættis
22:30 Náttartónleikur

**Lindin**

*Eingin skrá komin*

## Týsdagur 26. juni

**SVF**

18.15 Tíðindi fyri deyv
18.30 Noddy 1
18.40 Pedda Post 1:13
19.00 Scott 1:13
19.30 Veingjasuð – um flytifuglar
20.00 Dagur og Vika
20.20 Journalin: Prógvið, sum varð etið
20.50 Hóast sorgina – børn, sum hava mist
21.15 Állurin – virðisløntur japanskur filmur Óhóskandi fyri smábørn
23.10 Kvinnur í fongsli 3:6 – avstr. dokumentarrøð
23.35 Liðugt

**Eurosport.com**

07:30 Cycling
08:30 Table Tennis
09:30 All Sports
10:00 Athletics
11:00 Triathlon
12:30 All Sports
13:00 Football
14:00 Football
15:30 Cycling
16:00 Cycling (Live)
17:00 Xtreme Sports
17:30 Trial
18:30 News
18:45 Cycling
19:30 Boxing
22:00 News
22:15 Sidecar
23:15 Cycling
00:15 News
00:30 Close

**BBC Prime**

00.00 TLZ: »Secrets of World War II – The Real Heroes of Telemark«
01.00 TLZ: »Sperm Whales - Back from the Abyss«
02.00 TLZ: »Imagining New Worlds«
02.30 TLZ: »Introduction to Psychology – Two Research Styles«
03.00 TLZ: »What's Right for Children?«
03.30 TLZ: »A Living Doll: a Background to Shaw's Pygmalion«
04.00 TLZ: »Back to the Floor – Working Holiday«
04.40 TLZ: »Megamaths – Measure - Treasure Hunt«
05.00 TLZ: »Suenos World Spanish«
05.15 TLZ: »Suenos World Spanish«
05.30 TLZ: »English Zone«
06.00 Noddy: »Noddy and His Alarm Clock«
06.10 Angelmouse
06.15 Playdays
06.35 SMart on the Road
06.50 SMart on the Road
07.05 Belfry Witches
07.30 Celebrity Ready, Steady, Cook
08.00 Style Challenge: »Marquess of Bath«
08.25 Real Rooms
08.50 Bargain Hunt
09.25 Antiques Roadshow: »University of Birmingham«
10.10 X Creatures: »Shooting the Bigfoot«
10.40 TLZ: »Horizon – Supervolcanos«
11.30 Cathedral Calls: »Wells«
12.00 Celebrity Ready, Steady, Cook
12.30 Style Challenge: »Female Bikers«
13.00 Doctors
13.30 Classic EastEnders
14.00 Real Rooms
14.30 Bargain Hunt
15.00 Noddy: »Noddy and His Alarm Clock«
15.10 Angelmouse
15.15 Playdays
15.35 SMart on the Road
15.50 SMart on the Road
16.05 Belfry Witches
16.30 Top of the Pops Classic Cuts
17.00 Ainsley's Big Cook Out: »Brazil«
17.30 Doctors
18.00 Classic EastEnders
18.30 X Creatures: »Big Cats in a Little Country«
19.00 Hi-De-Hi
19.30 Next of Kin: »The Canal Boat Mutiny«
20.00 The Scold's Bridle
21.00 The Smell of Reeves and Mortimer
21.30 Top of the Pops Classic Cuts
22.00 Parkinson
23.00 Casualty: »Mix and Match«

**BBC World**

00.00 BBC News
00.30 HARDtalk (r)
01.00 BBC News
01.30 Click Online (r)
02.00 BBC News
02.30 Correspondent (r)
03.00 BBC News
03.30 Asia Today (r)
03.45 World Business Report (r)
04.00 BBC News
04.30 HARDtalk (r)
05.00 BBC News
05.30 Holiday (r)
06.00 BBC News
06.30 Correspondent (r)
07.00 BBC News
07.30 HARDtalk
08.00 BBC News
08.30 Future Fantastic (r)
09.00 BBC News
09.30 Earth Report (r)
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News
11.30 Click Online (r)
12.00 BBC News
12.30 Earth Report (r)
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk (r)
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Holiday (r)
15.00 BBC News
15.30 Earth Report (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Future Fantastic (r)
18.00 BBC News
18.15 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Talking Movies
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Reporters (r)
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

**TV3**

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:25 Ricki Lake(G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Panter-tanter
12:20 Vild med dig
12:50 Melrose Place - classic
13:45 Interne Affærer
14:45 Pæn pige - sej sild
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch
16:35 Ricki Lake
17:30 Sabrina - skolens heks
18:00 Susan - sød og single
18:30 Hvide Løgne
19:00 Skadestuen
20:00 Faktor 21 Film: Forbudt kærlighed
21:40 Pernilles Univers
22:40 Vore værste år
23:10 Simpsons
23:40 Ti tommelfingre
00:10 Monty Pythons flyvende cirkus
00:50 Ricki Lake (G)
01:45 Træneren
02:15 Vore værste år (G)
02:40 Monty Pythons flyvende cirkus(G)
03:15 Sunset Beach
03:59 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Eli Poulsen í Sumba lesur
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar Dia Midjord og Jákup Magnussen skipa fyri.
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Koparskrínið (e) Dánjal Joensen lesur 8. og seinasta part av framhaldssøgu eftir Jens Paula Heinesen.
09.33 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) Eli Poulsen í Sumba lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan - vika 2 Beinta Danielsen og Elsa Maria Bærentsen.
10.08 Tit skriva, vit spæla
11.00 Tíðindi
11.03 Á ferð um víddir (e) Robert McBirnie lesur 8. part av ferðafrásagnum eftir Niels Juel Nolsøe.
11.30 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.50 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Summarjazzur (e) Edward Nyholm Debes spælir tónleik.
15.00 Tíðindi
15.02 Zenith Helena Debes Højgaard, Beinta Løwe Jacobsen og Høgni í Jákupsstovu leggja til rættis.
16.00 Tíðindi
16.03 Zenith
17.00 Tíðindini
17.05 Tónasuð Tónleikasending hjá Rasmus Magnussen.
18.00 Barnaútvarpið Jonna Olsen og Kári Sólstein skipa fyri.
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Heimurin í dag Árni Joensen leggur til rættis.
19.30 Poppservice Høgni Zachariassen stílar fyri
20.30 Sálmar og sangir Jónheðin Tróndheim leggur til rættis
21.00 Fimleikaløtan - vika 2 (e) Beinta Danielsen og Elsa Maria Bærentsen.
21.05 Dagsetur
22.00 Tíðindi

**Rás 2**

09:45 Orðið Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Góðanmorgun-tónleikur
11:00 Breytin (e) Ferðslusendingin frá fríggjadegnum
12:00 Tíðindi & lýsingar
12:15 Tónleikur
13:00 Leysaløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi & lýsingar
15:15 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Lættur tónleikur
17:00 Laila Beinleiðis (e) Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
18:00 Lýsingar & Tíðindi
18:15 Lættur tónleikur
19:30 Hálvtímin Andalig temasending. Evni: Himmalin Anja Hansen leggur til rættis.
20:00 Lættur tónleikur
21:00 Tíðindi & lýsingar
21:15 Orðið (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Á Torginum EvR Sending Øssur Andreasen leggur til rættis.
22:00 Tónleikur

**Lindin**

*Eingin skrá komin*

gult17 cyan17 magenta17 svart17